| FINANSMINISTERIET | |
|---|---|
| Aftale om statens tilskud til Færøernes hjemmestyre i perioden 2017-2019 | Avtala um ríkisveiting til Føroya fyri tíðarskeiðið 2017 til 2019 |
| Den nuværende lov nr. 1602 af 26. december 2013 om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2014-2016 udløber med udgangen af 2016. Der skal derfor indgås ny aftale om statens tilskud til Færøerne. | Ríkislóg nr. 1602 frá 26. desember 2013 um ríkisveiting til Føroya fyri 2014 til 2016 fer úr gildi við árslok 2016. Neyðugt verður tí við nýggjari avtalu um ríkisveitingina til Føroya. |
| Regeringen og Færøernes landsstyre er enige om en ny aftale om statens tilskud til Færøernes hjemmestyre, som indeholder følgene elementer: | Danska stjórnin og Føroya landsstýri eru samd um nýggja avtalu um ríkisveitingina við hesum innihaldi: |
| 1. Aftalen gælder for tre år og omfatter perioden 2017-2019. | 1. Avtalan er galdandi í trý ára tíðarskeiðnum 2017 til 2019. |
| 2. Statens tilskud fastholdes nominelt uændret på 641,8 mio. kr. i hvert af årene. | 2. Ríkisveitingin er óbroytt 641,8 mió.kr. um árið. |
| 3. Hvis Lagtinget ved beslutningsforslag træffer beslutning om at reducere statens tilskud med et bestemt beløb, meddeler Færøernes landsstyre dette til regeringen. Landsstyret skal i givet fald meddele dette senest i oktober året forinden, for at reduktionen skal have virkning. Statens tilskud vil blive reduceret i overensstemmelse hermed og vil fra regeringens side blive gennemført ved bekendtgørelse. | 3. Ger Løgtingið av at lækka ríkisveitingina við uppskoti til samtyktar, boðar Føroya landsstýri donsku stjórnini frá hesum. Føroya landsstýri skal boða frá hesum í seinasta lagi í oktober árið frammanundan, at lækkingin skal hava virknað. Ríkisveitingin verður tá lækkað samsvarandi við ríkiskunngerð. |
| 4. Finansministeriet udarbejder et lovforslag, der indeholder ovenstående elementer. Lovforslaget sendes til høring hos Færøernes landsstyre i overensstemmelse med reglerne herom. | 4. Ríkismyndugleikin ger uppskot til ríkislóg við omanfyristandandi innihaldi. Uppskotið verður sent til hoyringar hjá Føroya landsstýri samsvarandi vanligum leiðreglum. |
| 5. Lovforslaget fremsættes for Folketinget i oktober med henblik på vedtagelse inden | 5. Uppskotið um ríkislóg verður lagt fram í Fólkatinginum í oktober til at verða samtykt áðrenn árslok 2016 við javnsettari viðgerð av ríkislógaruppskotinum á Løgtingi og í Fólkatinginum, samsvarandi vanligum leiðreglum. |

| | |
|---|---|
| udgangen af 2016 i overensstemmelse med retningslinjerne om parallel behandling af lovforslag i Folketinget og Lagtinget.<br><br>6. Det vil fremgå af lovforslaget, at statens tilskud for 2016 ligeledes udgør 641,8 mio. kr.<br><br>På vegne af regeringen, den 19. april 2016.<br><br>Claus Hjort Frederiksen, finansminister | 6. Í ríkislógaruppskotinum verður ásett, at ríkisveitingin fyri 2016 eisini er 641,8 mió. kr.<br><br>Vegna Føroya landsstýri, hin 19. Apríl 2016<br><br>Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í fíggjarmálum |